**Býráðsfundur mánadagin 25. november 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

| | Fundarskrá: | Fundarsamtykt: |
|---|---|---|
| **1.** | **13/00492**<br>**Umsókn frá Tavuni um byggiloyvi á matr. nr. 173 til eina hædd afturat verandi byggiloyvi**<br>Umsóknin er ikki fullfíggja og er hetta grunda á, at umsóknin fevnir um loyvi, at seta eina hædd uppá bygningin, sum nú verður bygdur. Hvat hæddin skal brúkast til er ikki endalig avgerð tikin um. Upplýst er, at hæddin verður ikki tikin í nýtslu fyrr enn heimild er til hetta. Grundin til hetta er eisini kostnaðurin í mun til eina fyribils takkonstruktión.<br>Umsóknin fevnir um loyvi at seta eina hædd yvir bygningin sum hevur fingið byggiloyvi.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at Tavan fær heimild at inniloka 1. hædd, tó er hetta treyta av, at brunakrøv og rýmingarleiðir v.m. fyri alla 1. hædd lýkur treytirnar sambært KBB 99. | Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Jóhan Christiansen, Brandur Jacobsen<br>Hjalti Dalheim, Árni Jacobsen<br>Hanna Jensen, Ólavur Olsen<br>Emma Rasmussen, Hanus Jacobsen<br><br>**Atkvøddi ímóti:**<br>Oluffa Joensen |
| **2.** | **13/00406**<br>**Fyrispurningur frá Haldu Johannesen um vinnurstykki í Norðragøtu, matr. nr. 115d**<br>Á fundi í Byggi- og býarskipanarnevndini tann 19. september 2013 var málið tikið skránni.<br>Nýggj umsókn um grundstykki í Norðragøtu.<br><br>Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at gera eina heildarætlan fyri Norðragøtu, víst verður til mál nr. 13/00278 ið er " Uppskot til heildarætlan fyri Norðragøtu og Syðrugøtu".<br>Somuleiðis verður mælt til at byggisamtyktin verður broytt til øki G, neystabygging. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndin, og at umsóknin hjá Haldu Johannesen verður tikin við í viðgerðini av heildarætlanini fyri Oyruna. |
| **3.** | **13/00287**<br>**Fyrispurningur frá Hallur Poulsen um keyp av matr. nr. 115d í Norðragøtu**<br>Á fundi í Byggi- og býarskipanarnevndini tann 19. september 2013 var málið tikið skránni.<br><br>Málið hevur so verið aftur til viðgerðar á fundi í Byggi- og býarskipanarnevndini tann 13. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini, men atkomuviðurskiftini til grannarnar skulu dagførast og skipast áðrenn. |

**Býráðsfundur mánadagin 25. november 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

november 2013, og bleiv tá samtykt at mæla til at Hallur Poulsen fær loyvi at keypa mart. nr. 115d í Norðragøtu.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**4. 13/00428**

**PE Norðragøtu hevur ætlan um útbygging og parkeringsøki – matr. nr. 79c í Norðragøtu.**
Umsókn um útbygging av PE í Norðragøtu.

Leiðarin av handlinum PE, Bjøgfinnur Heinesen, hevur sent skriv við ymsikum ætlanum um at víðka handilin, parkeringsøki og fríðkan fram við ánni.

Málið er ikki ein endalig umsókn, men ætlanir ið fyritøkan hevur um víðkan av handlinum og umstøður viðv. parkering av bilum og atkomu. Leiðarin av handlinum PE ynskir at fáa upplýst, um hetta kann lata seg gera ella ikki.

Byggi- og býarskipanarnevndin mælir frá at geva byggiloyvi til at víðka um handilin sum støðan er í dag og staðsetingina av bygninginum. Frámælið er grunda á, at verandi bygging er 0,3, ið er fult útbygt byggistig. Harumframt er trupuleikar við parkering, ferðslu eftir høvuðsvegnum og at kundar skulu ganga tvørtur um høvuðsvegin í Norðragøtu.

Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen, Oluffa Joensen
Brandur Jacobsen, Hjalti Dalheim
Árni Jacobsen, Hanna Jensen
Hanus Jacobsen, Ólavur Olsen

**Atkvøddi blankt:**
Emma Rasmussen

**5. 2.viðgerð av eykajáttan til nýtt býráðshús**

Á seinasta býráðsfundi bleiv samtykt at veita eykajáttan á kr. 200.000,00 og at peningurin verður tikn av innistandandi.

Eingin broyting er frá 1. viðgerð, og fíggjarnevndin mælir til at samtykkja máli eins og við 1.viðgerð

Einmælt samtykt eins og við 1. viðgerð.

**6. 13/00436**

**2.viðgerð av fíggjarætlan fyri 2013**
Fíggjarnevndin mælir til fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri 2014

**Høvuðstøl:**

Ólavur Olsen setti fram soljóðani broytingaruppskoti:

*Tikið verður undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini, við tí broyting at íløgan á*

**Býráðsfundur mánadagin 25. november 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

- Rakstrarútreiðslur 54.562.000,00
- Løguútreiðslu 19.840.000,00
- Inntøkur 67.606.000,00

- Avdráttir 7.447.000,00
- Rentuútreiðslur 2.550.000,00

- Rentustuðul 1.700.000,00

**Fígging:**
- Lántøka 10.000.000,00
- Av innistandandi 8.494.000,00

Skattaprosentið verður óbroytt 21 og barnafrádrátturin óbroyttur 5.000,00 kr.

*6 mió kr. til nýtt býráðshús verður strikað, og at lántøkan verður lækkað frá 10 mió. til 4. mió. Samlaða úrslitið eftir rentir, avdrátt og íløgur verður tá eitt hall á 12.494.000,00 kr. í mun til 18.494.000,00*

Fyrst bleiv atkvøtt um broytingaruppskoti hjá Ólavur Olsen og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Ólavur Olsen

**Atkvøður ímóti:**
Emma Rasmussen, Árni Jacobsen
Oluffa Joensen, Jóhan Christiansen
Brandur Jacobsen, Hjalti Dalheim
Hanus Jacobsen, Hanna Jensen

Sostat er uppskoti fallið

Síðani bleiv atkvøtt um uppskoti hjá fíggjarnevndini og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Emma Rasmussen, Árni Jacobsen
Oluffa Joensen, Jóhan Christiansen
Brandur Jacobsen, Hjalti Dalheim
Hanus Jacobsen, Hanna Jensen
Ólavur Olsen

Sostatt er uppskoti hjá fíggjarnevndini samtykt.

**7. 13/0226**
**Barnaverndarsamstarv**

Sambært Barnaverndarlógini § 4 og brævi frá Almannaráðnum dagfest 23. oktober 2013 skulu kommunurnar senda Almannaráðnum samstarvsavtalur um barnaverndarsamstarv innan 1. desember 2013.

Avtalunar skulu góðkennast av landsstýrismanninum í almannamálum, og koma í gildi 1. januar 2014.

Jóhan Christiansen skjýtir upp at taka undir við fyriliggjandi sáttmála um barnaverndarsamstarv við Fuglafjarðar kommunu.

Brandur Jacobsen setti fram broytingaruppskot:

*Eysturkommuna fer í samráðingar við Runavíkar kommunu, Sjóvar kommunu og Nes kommunu um barnaverndarsamstarv við støði í fyriliggjandi samstarvssáttmála*

**Býráðsfundur mánadagin 25. november 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

*um samstarv í millum Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu, tó við tí treyt at barnaverndarumsitingin verður stasett í Eysturkommunu*

Oluffa Joensen setti fram broytingaruppskot:

*Tikið verður undir við fyriliggjandi uppskoti til samstarvssáttmála við Fuglafjarðar kommunu, við tí broyting at stk. 2 í § 5 verður strikað*

Fyrst bleiv atkvøtt um uppskoti hjá Brandi Jacobsen og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Hanus Jacobsen, Brandur Jacobsen

**Atkvøður ímóti:**
Emma Rasmussen, Árni Jacobsen
Jóhan Christiansen, Hjalti Dalheim
Hanna Jensen, Ólavur Olsen

**Atkvøddi blankt:**
Oluffa Joensen

Sostatt er uppskoti fallið

Síðani bleiv atkvøtt um uppskotið hjá Oluffu Joensen og atkvødd bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Oluffa Joensen

**Atkvøður ímóti:**
Árni Jacobsen, Jóhan Christiansen
Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen

**Atkvøddi blankt:**
Brandur Jacobsen, Hanus Jacobsen
Emma Rasmussen, Hanna Jensen

Sostatt er uppskoti fallið

**Býráðsfundur mánadagin 25. november 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

Síðani bleiv atkvøtt um uppskoti hjá Jóhan Christiansen og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Emma Rasmussen, Árni Jacobsen
Oluffa Joensen, Jóhan Christiansen
Hjalti Dalheim, Hanna Jensen
Ólavur Olsen

**Atkvøddi ímóti:**
Brandur Jacobsen

**Atkvøddi blankt:**
Hanus Jacobsen

Sostatt er uppskotið hjá Jóhan Christiansen samtykt.

**8. 13/00136**
**Bátahylurin og umhvørvi rundan um bátahylin undir Gøtueiði**
Støðutakan til innkomi tilboð

Tilmæli frá vinnunevndini og fíggjarnevndini fyriliggja.

*Málið verður viðgjørt fyri afturlætnum hurðum*

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Hanus Jacobsen ______________________________

Emma Rasmussen ______________________________

Hjalti Dalheim ______________________________

Ólavur Olsen ______________________________

Árni Jacobsen ______________________________

**Býráðsfundur mánadagin 25. november 2013 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Hanus Jacobsen, Emma Rasmussen, Hjalti Dalheim, Ólavur Olsen, Árni Jacobsen, Oluffa Joensen, Brandur Jacobsen

**Fundurin lokin kl. 23.00**

Oluffa Joensen ______________________________

Brandur Jacobsen ______________________________